# ÚTSØLAN

BYRJAR MIKUDAGIN 15. JAN. KL. 8.00

Hópin av reststøddum fyri nógv niðursettar prísir!

NB!
Týsdagin 14. jan.
er stongt

DADDAN

Á Hálsi - Smyrilsvegur 7 - Tórshavn



# ÚTSØLA

hjá Skilling í SMS



mikudagin 15. januar

Í dag byrjar útsølan hjá Skilling, vit selja brillustell fyri

-75 % -60 % -15 %

SKILLING

Skilling Optik SMS , SMS, Tórshavn Tel. 31 56 56 / 31 86 88, Fax 31 86 87



www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo


## Tvingsilssøla

**Hósdagin 6. februar 2003, kl. 9.15** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognirnar **matr. nr. 27, 31 og 37, Norðtoftir,** (AS 2-36/2002).

Talan er um jarðarstykkir:
**Matr. nr. 27, Norðtoftir:** 1 gyllin av parti í haga Norðtoftahagi 2/9 í felags matr. nr. 45.
**Matr. nr. 31, Norðtoftir:** 1 gyllin av parti í haga Norðtoftahagi, 2/9 í felags matr. nr. 45.
**Matr. nr. 37, Norðtoftir:** 2 gyllin og 10 skinn av parti í haga Norðtoftahagi, 5/9 í felags matr. nr. 45.

Víst verður annars til tvingsilssøluuppstillingina, sum er gjørd í samband við tvingsilssøluna.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Jógvan E. Ellefsen, advokati, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tel. 311260, (sak nr. 4467901)** sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**
hin 9.1.2003

## Tvingsilssøla

**Hósdagin 6. februar 2003, kl. 9.00** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina **matr. nr. 24 a, Depil,** (AS 2-37/2002).

Talan er um jarðarstykki: 2 gyllin uttangarðsjørð í haganum Norðari Partur Depil og 5 lutir innangarðsjørð í Depils bygd, umframt 1/2 av felagslutinum matr. nr. 147, Depil.

Víst verður annars til tvingsilssøluuppstillingina, sum er gjørd í samband við tvingsilssøluna.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Jógvan E. Ellefsen, advokati, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tel. 311260, (sak nr. 4476901)** sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**
hin 9.1.2003


<ph_1>



<ph_1>
<ph_1>
<ph_1>

2. hvønn mikudag

Tað er feitt

www.sosialurin.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin




## Lívbjargarar til Klaksvíkar Svimjihøll

Søkt verður eftir einum mannligum og einum kvinnuligum lívbjargara til svimjihøllina í Klaksvík.

-

Umframt at arbeiða sum lívbjargari, fevna størvini um at taka eina hond í ymiskt í tí dagliga.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal vera góður svimjari og hava lívbjargararoyndina. Skipað kann eisini verða fyri lívbjargararoynd í samband við setan.

**Setanarviðurskifti:**
Talan er um tvey fulltíðarstørv, sum eru skipaði í vaktir. Størvini verða at seta skjótast gjørligt. Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

**Meira fæst at vita** um størvini við at venda sær til Kára Kjælnæs, svimjihallarleiðara, telefon 219712.

**Umsókn:**
viðmerkt „lívbjargari", saman við heilsuváttan, møguligum viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir, skulu vera Klaksvíkar Kommunu, Postboks 2, 700 Klaksvík, í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. januar 2003.

**Klaksvíkar Býráð**

## Skeið

Nøkur fá pláss eru eftir til grundskeiði fyri nevndarlimir og álitisfólk í viku 5.
Seinasta freist at melda seg til er mikudagin **15. januar 2003.**

**Føroya Arbeiðarafelag**
tlf. 312101 – faks 315374


## REINAN BIL!

- Vit avfeitta og vaska
- Vaska innan sum uttan
- Bona, polera o.a.
- Vit heinta og seta bilin aftur

**Sport Wheels, tel. 253352**
Gripsvegur 26. Ringi og fái eina tíð. Opið kl. 8-20


## Fólk søkist

Fólk søkist at arbeiða fulla tíð til Thomas Dam Búnýti at byrja beinanvegin.

Roynd innan handil er ein fyrimunur.

Thomas Dam búnýti

Niels Finsensgøta 18 · Box 1094 · FO-110 Tórshavn
Tlf. 314930 · Fax 314933

Starv

# Skrivstovufólk




**Avloysarastarv**
Í sambandi við barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir einum avloysara, til starvið sum skrivstovufólk á fólkaflutningsdeildini, í umleið 1 ár.

**Uppgávurnar hjá fólkaflutningsdeildini**
Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og mennastýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá fyritøkuni.

Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsuppgávur:
- Planlegging
- Rakstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

**Uppgávur hjá tí, ið sett/ur verður**
Uppgávurnar hjá skrivstovufólkinum verða m.a. at taka sær av:
- Avrokningum til privatu arbeiðstakararnar
- Elektronisku skúlakortunum
- At avlesa modulir til Buscom-skipanina
- Skaðafrágreiðingum v.m.
- Fyrifallandi uppgávum á skrivstovuni
- Vanligari kundavgreiðslu

**Førleikakrøv**
- Góðan tænastuhugburð
- Góðan edv-kunnleika
- Málrættað/ur
- Góðan røkjuskap
- Góð samstarvsevnir
- Fyrimunur er, um tann, ið settur verður, hevur royndir og kunnleika innan bókhaldsskipanina Navision
- Góð evnir at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, og er lønt í lønarflokki 2.
Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður, kann byrja 1. mars 2003.

**Umsóknir**
*Umsókn við próvskjølum skal sendast til:*
*Strandfaraskip Landsins*
*att. Starvsfólkadeildin*
*Boks 88*
*FO-110 Tórshavn*
og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 24. januar 2003.
Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Guðrið Ellefsen, á tlf. 34 30 00 ella á e-post: *gue@ssl.fo*.

Strandfaraskip Landsins er ein lands-fyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.
Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

STRANDFARASKIP LANDSINS

34 30 00 · www.ssl.fo

## Aðalfundur

Aðalfundur Fótbóltssamband Føroya verður

**leygardagin 22. februar 2003, kl. 10.00.**

Nærri verður fráboðað seinni hvar fundurin verður.

Fundarskrá sambært lógunum.

**Fótbóltssamband Føroya**


# Rør & Blikk

## RØR & BLIKKSMIÐUR

Søkt verður eftir royndum Rør og Blikksmiði, arbeiðið fevnir mest um nýgerð av miðalstórum bygningum.

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tlf. 322 999 far. 225 345

Rør & Blikk fæst umfram alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svimjihylar

Rør & Blikk, Undir Gráasteini 65, 100 Tórshavn, tlf: 322 999 far 225 345
www.rorblikk.fo